## Burturfluttir hermenn liva

Tveir ísraelskir hermenn, sum vórðu burturfluttir seinasta summar, eru framvegis á lívi. Tað var Hizbollah, sum burturflutti teir báðar hermenninar, og burturflytingarnar vóru byrjanin til kríggið í Suðurlibanon millum Ísrael og Hizbollah. Um vikuskiftið var franski uttanríkisráðharrin í Libanon, og har fekk hann at vita, at teir báðir hermenninir eru á lívi. - Eg fekk vissu fyri, at samráðingarnar um at lata hermenninar leysar halda fram, og at tær ganga tann rætta vegin, sigur Bernard Koucher við BBC.



## Eldur kom í bilin

Klokkan tvey leygarnáttina ringdi fólk av Skála til løgregluna og boðaðu frá, at tey høvdu sæð ein bil við nógvari ferð eftir vegnum, tá ið brádliga ljósglæma stóð frá honum. Løgreglan sendi sjúkrabilin avstað, men tá ið boðini komu um, at bilførarin varð sloppin óskalaður. Samstundis vísti tað seg, at eldur var komin í bilin. Sostatt varð sjúkrabilurin kallaður heim aftur og sløkkiliðið sent á staðið ístaðin. Men har var onki at gera og bilurin kolaðist upp. Annars hevur tað verið sera friðarligt hjá løgregluni nú leygarnáttina.

# Fiskimenn skulu ikki rørast

**Verður fiskimanna-frádrátturin rørdur, soleiðis, sum lands-stýrismaðurin í fíggjarmálum vil, fara vit at seta tiltøk í verk við brestin og ein avleiðing kann verða, at flotin verður lagdur**

FRÁDRÁTTUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Verður frádrátturin hjá fiskimonnum skerdur, er tað væl hugsandi, at flotin verður lagdur, sigur formaðurin í Føroya Fiskimannafelag*

Verður skattalættin hjá fiskimonnum skerdur, fara vit at seta tiltøk í verk við brestin.

Tað staðfestir Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag.

Á miðdegi fríggjadagin staðfesti Magni Laksáfoss, landsstýrismaður í fíggjarmálum í Útvarpinum, at hann fer at mæla samgonguni til at lækka skattafrádráttin hjá fiskimonnum.

Men tað fer Fiskimannafelagið undir ongum umstøðum at góðtaka.

- Hvørji tiltøk, vit fara at seta í verk, ber ikki til at siga nú, tí tað mugu vit tosa um. Men tað kann so væl henda, at flotin verður lagdur, sigur hann.

Hann leggur kortini afturat, at hann bæði vónar og væntar, at politisku kreftirnar í samgonguni, sum hugsa um trivnaðin og korini hjá fiskimonnum, eru so mikið sterkar, at ætlanin hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum, verður kvald í føðingini.

- Men skuldi tað hent, at hann fær undirtøku, fara vit at svara aftur við brestin, endurtekur hann.

### Flýggja av landinum

Hann sigur, at tað gongur so striltið at manna fiskiskipini, at verður frádrátturin skerdur, fer tað at vera ein stórur trupulleiki hjá flotanum.

Hann ivast ikki í, at verður frádrátturin skerdur, fer at tað verða ein alvorligur trupulleiki at manna skipini.

Fiskimenn fáa nógv beri sømdir í øllum okkara grannalondum og tí leita okkara fiskimenn í stórum tali við útlendskum skipum.

- So verða umstøðurnar í Føroyum skerdar, fara fiskimenn at flýggja av landinum og tað verður til óbótaligan skaða fyri okkara høvuðsvinnu.

Hann sigur, at tað eru serliga teir royndu menninir, sum fara.

- Hetta er ein stórur trupulleiki, tí tað tekur eini sjey ár at útbúgva ein fullkønan trolmann. Tí stendur eisini á hjá skipunum at fáa roynt fólk. Hinvegin er roynt fólk ein fortreyt fyri at vit kunnu varðveita okkara høvuðsvinnu sum eina sterka vinnu.

### Skerji heldur á landi

Hann mælir heldur til, at virksemið á landið verður skert, so at tað verður lættari at fáa manning til skipini, so at okkara høvuðsvinna ikki verður amputerað, tí so fer tað at raka alt landið.

- Tað er ikki í fiskiflotanum, at búskapurin er ov heitur. Tað er tað nógva virksemið á landið, sum er í ferð við at hita búskapin so nógv, at vandi er fyri, at hann kollsiglur.

Men arbeiðið á landið er ikki líka umráðandi sum arbeiðið í okkara høvuðsvinnu. Tí mæli eg til, at virksemið á landið verður skert, so at tað verður lættari at fáa fólk til skipini.

Í hesum sambandi mælir hann til, at ætlanin at gera Stórutjørn verður steðgað, tí tað er ein so stór verkætlan, at tað er til stóran vanda fyri okkara búskap, nú hann er so heitur frammanundan.

- Verður virksemið á landið skert, sleppa vit eisini undan at innflyta útlendska arbeiðsmegi, tí tað kann verða til stóran skaða.

- Úr okkara grannalondum vita vit, at tað er so skjótt, at hetta kann enda við tí, sum líkist trælahandli og tað eiga vit ikki at lata um okkum ganga í Føroyum. Tí eiga vit ikki at fáa ov nógv fremmanda arbeiðsmegi, men heldur at minka virksemið, so at vit klára okkum við okkara egna fólk.



*Gongur, sum formaðurin í Fiskimannafelagnum droymir um, fær hesin kapping -ella kanska hjálp- frá einum privatum vaktarskipi hjá Fiskimannafelagnum*

# Droymir um egið vaktarskip

**Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag hevur ein dreym um, at fiskimannafelagið fær sítt egna vaktarskip**

FISKIVEIÐIEFTIRLIT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg droymi um, at vit í Føroya Fiskimannafelag, fáa okkara egna vaktarskip.

Tað sigur Jan Højgaard, formaður í felagnum.

Hann sigur kortini, at tað eru ongar ítøkiligar ætlanir um hetta.

Men hetta er bara nakrir dreymar eg havi, at tað hevði ikki verið so býtt, at vit høvdu okkara egna vaktarskip.

Hann ásannar, at tað ein trupulleiki hevði verið, at eitt slíkt vaktarskip hevði ongan myndugleika havt.

- Men so kundu vit í øllum førum boða Fiskiveiðieftirlitinum frá, tá ið við komu fram á ólógligan fiskiskap.

Hann sigur, at søgur ganga um ólógligan fiskiskap av ymsum slagi uttan tó, at hann veit nøkur ítøkilig dømi um tað.

- Men at vit hava kunnleika til slíkar søgur, kundi havt tað úrslit, at vit kanska høvdu havt eitt betri eftirlit enn Vaktar- og Bjargingartænastan hevur havt.

- Eg veit ikki, hvussu nógv er í hesum søgum, men høvdu vit okkara egna vaktarskip, høvdu vit kannað tær søgur, vit hoyra.

Men er tú ikki bangin fyri at ganga tínum egnum limum ov nær, fáa tit tykkum tykkara egna vaktarskip at halda eyguni við fiskiskapinum?

- Fiskimenn eru góðir við stovnarnar og hava allar størsta áhugan í, at teir verða varðveittir og tí kann ólógligur fiskiskapur ikki góðtakast, sigur hann.

Men, hvussu hevði Fiskimannafelagið hugsa sær at fíggja eitt slíkt vaktarskip?

- Sjávandi er tað dýrt, men tað er als ikki óhugsandi, at vit kundu fingið Green Peace, ella onkran annan umhvørvisfelagsskap at fíggja tað.

Hann leggur afturat, at talan hevði ikki verið um ein serliga stóran bát, tí hann hugsar um ein glastrevjabát upp á nakrar og tríati, ella fýrati føtur.